GJALDSTOVAN

**Merkið roknskaparskjølini við roknskaparári**

Nú ið ársskiftið 2020/2021 er beint fyri stavn, verður heitt á stovnarnar, ið senda Gjaldstovuni skjøl at bóka, um at gera Gjaldstovuna varuga við, hvørji skjøl skulu bókast á fíggjarárið 2020.

Tá ið farið verður um ársskiftið 2020/2021, verður heitt á stovnarnar, ið senda Gjaldstovuni skjøl at bóka, um at eyðmerkja roknskaparskjølini við ávikavist ”2020” og ”2021”.

Er rokning, sum viðvíkur 2021, ljóslisin við ”GL Date” í 2020 - tí fakturadagfestingin er í 2020 - ber til at broyta ”GL Date” til at vera 01-21, so rokningin kortini verður bókað á fíggjarárið 2021. Og umvent - rokning, sum viðvíkur 2020, ljóslisin við ”GL Date” í 2021 - tí fakturadagfestingin er í 2021 - ber til at broyta ”GL Date” til at vera 12-20 ella 13-20, so rokningin kortini verður bókað á fíggjarárið 2020.

GJALDSTOVAN | TEL: +298 35 24 00 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | GJALDSTOVAN.FO